# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 15.05.2019 kl. 17.30

Á fundi: Eir J. Norðberg
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Poul Laust Christiansen (fyri Janus Thomsen)

Ikki møtt: Magni Bertholdsen
Sten Spange Larsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi til at taka eitt mál við aftrat – kemur á skránna sum mál nr. 6.

1. **Skriv viðv. reingerð á dagstovninum.**
   Gjørt verður vart við, at tørvur er á fleiri tímum til reingerðina á dagstovninum.
   **Trivnaðarnevnd 13.05.2019:**
   Nevndin mælir til, at tímatalið til reingerð verður økt við 2 tímum um vikuna.
   **Fíggjarnevnd 15.05.2019:**
   Nevndin hevur sama tilmæli sum Trivnaðarnevndin.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

2. **Skriv viðv. skúri og millumbygningi á dagstovninum.**
   Til viðgerðar er kostnaðarmeting av at umvæla skúrin við vøggustovuna, býtt upp í raðfestingar.
   **Trivnaðarnevnd 13.05.2019 og Fíggjarnevnd 15.05.2019:**
   Nevndirnar mæla til at játta pening til raðfesting 1 í ár og raðfesting 2 sum íløga komandi ár.
   **Avgerð:**
   Samtykt við fýra atkvøðum fyri.

3. **Skriv viðv. normering og starvslýsing juni 2019.**
   Søkt verður eftir námsfrøðingum til føst størv sambært hjálagda uppskoti frá dagstovnaleiðaranum. Um námsfrøðingar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv eitt ár fram.
   Søkt verður haraftrat um, at uppnormering av nøkrum størvum heldur fram.

   **Trivnaðarnevnd 13.05.2019:**
   Mælt verður til fylgja tilmælinum – nevndin hevur ongar viðmerkingar.

**Fíggjarnevnd 15.05.2019:**
Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá leiðaranum.
**Avgerð:**
Samtykt við fýra atkvøðum fyri at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

4. **Skriv frá borgara viðvíkjandi víkiplássi.**
Mál viðvíkjandi víkiplássi til viðgerðar.
**Vega- og havnanevnd 13.05.2019:**
Nevndin mælir til, at kommunan ger marknaumskipan á umleið 40 m2 eftir kostnaði hjá Búnaðarstovuni kr. 69,00 pr. m2.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

5. **Skriv viðvíkjandi vegi.**
Skriv viðvíkjandi gerð av vegi.
**Vega- og havnanevnd 13.05.2019:**
Nevndin mælir til, ikki at gera annan veg, tá vegur longu er til ognina.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við avgerðini hjá nevndini.

6. **Umsókn frá Búnaðarstovuni vegna SEV og Articon til hoyringar.**
Til hoyringar umsókn frá SEV um graviloyvi til at leggja háspenningskaðal og um loyvi at seta eina fyribils transformarastøð upp við tunnilsvegin sambært hjáløgdum kortum.
Umsókn frá Articon um loyvi at planera eitt øki til arbeiðsskúrar, sum verða tiknir burturaftur um umleið 2 ár.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknunum frá SEV og Articon. Kommunustýrið hevði ongar viðmerkingar.

7. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.45

Eir J. Norðberg Niels Olaf Eyvindsson Gunnhild Mortensen

Rúni Thomsen Poul Laust Christiansen